# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Absalon Tvørfoss** úr Norðragøtu andaðist í heiminum sunnudagin 11. september, 70 ára gamal. Kistan fer úr heiminum í kirkjuna í Gøtu mikudagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 14.00.

Tey, ið vilja minnast Absalon, kunna lata Kirkjuliga Missiónsfelagnum eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Charlotta Christiansen,** Porkeri, andaðist mánadagin 12. september, 95 ára gomul. Kistan fer úr Eldrasambýlinum í Vági í Porkeris kirkju í kvøld klokkan 17. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Charlottu, kunnu lata eina gávu til Missiónshúsinum í Porkeri.

**Saloma Frederiksen,** Múli, andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 11. september, 92 ára gomul. Kistan fer frá kapellinum hóskvøldið klokkan 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður fríggjadagin klokkan 13.30 frá Christianskirkjuni í kirkjugarðin í Norðdepli.

Tey, sum vilja minnast Salomu, kunnu lata Norðoya Røktarheimi eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum gleddu meg á 75 ára degnum tann 24. juni 2005 og gjørdu mær dagin so hugnaligan og ógloymandi.

Tøkk til tykkum øll, sum á ein og annan hátt mintust til mín.

Harrin signi tykkum øll.

**Elin Thomsen, Klaksvík**

**80 ár**

Í dag, 14. september fyllir Margith Nielsen á Eiði 80 ár. Tey, ið hava hug at heilsa uppá Margith, eru vælkomin inn á gólvið millum kl. 12.00 og 18.00.

**Dagurin**

**14. september. Dýrd krossins.** Eisini rópt krossmessa um heystið. Krossurin, sum drotningin Helena fann, Kristi krossur, varð tikin og fluttur burtur av heidningum, men funnin aftur og førdur til Jerusalems.

Dagurin hátíðarhildin til minnis um hesa hending.

*14. september er eisini dagurin, tá ið atkvøðugreiðsla í 1946 var í Føroyum um samband við Danmark ella loysing.*

Trygvi Hansen, Hoyvík:

## Starvsdag hjá Føroya Shell




Hjá Føroya Shell hava tey tann politikk, at tey gera nakað burtur úr, tá starvsfólk hava rundar starvsdagar, og 3. september 2005 hevði Trygvi Hansen starvast 15 ár í fyritøkuni. Hetta bleiv eisini markerað.

Trygvi er 39 ára gamal og havnarmaður. Hann lærdi til maskinsmið hjá P/F Wenzel Petersen og varð útlærdur í 1988.

Eftir at hava koyrt lastbil hjá Just Sivertsen í tvey ár fekk hann starv hjá Føroya Shell 3. september 1990. Fyrstu árini koyrdi hann tangabil, og síðan 1. januar 1993 hevur hann arbeitt sum oljufýrservicemaður.

Trygvi sigur, at hesi árini hann hevur arbeitt í hitatænastuni eru oljufýringarnar vorðnar nógv stabilari, tað er sjáldan at tær t.d. steðga av stormi og ringum veðri. Arbeiðstíðin verður fyri tað mesta brúkt til at gera tey árligu eftirlitini.

Annars er at siga um Trygva at honum dámar væl at renna – eisini saman við starvsfeløgunum. Umframt at hann luttekur í flestu rennikappingum í Føroyum, hevur hann eisini luttikið í eini marathonkapping í Keypmannahavn.

Trygvi er giftur Mary, f. Johannesen, úr Havn. Tey búgva í Hoyvík og eiga trý børn: Rannvá, Svanna og Hørður.

## Dygdartilfar til verksmiðjuprís

**Møguleikarnir fyri at finna dygdarvørur til sámuligir prísir eru rættiliga avmarkaðir, tá byggjast skulu hús í Føroyum**

BYGGING
*Tíðindaskriv*

Hesa royndirnar gjørdi Harald Winther Knudsen sær, tá hann í 2001 flutti til Føroyar og fór undir at byggja sær og familjuni eitt nýtt heim. Hann hevði góðan kunnleika til byggimarknaðin í Danmark, tí at hann í fleiri ár hevur arbeitt við at økja um virði á bygningum við at finna dygdarvørur til rættan prís í sambandi við bygging og umbyggingar.

Tá Harald saman við føroysku konu síni og børnunum avgjørdi at seta búgv í Føroyum, gjørdi hann av, at nú skuldi hann undir sítt síðsta byggiprojekt, og byggja sær júst tey húsini hann altíð hevði ynskt sær.

Men tað gjørdist ikki so lætt, sum hann hevði ímyndað sær. Við sínum kunnleika til útboð og prísir, ásannaði hann, at fleiri avmarkingar eru á føroyska marknaðinum. Hann undraði seg yvir, hví prísir og útboð í Føroyum vóru so nógv øðrvísi enn í Danmark og aðrastaðni í Evropa. Harald fór tí sjálvur í holt við at kanna møguleikan fyri at flyta útvaldar vørur inn sjálvur til ein bíligan prís, og hetta kanningararbeiðið endaði við, at meginparturin av húsunum í Hákunargøtu í Hoyvík varð gjørdur úr tilfari, sum hann sjálvur innflutti.

Eitt nú setti hann serlig krøv til vindeyguni.

– Vindeygu skulu eftir mínum tykki vera so frí fyri viðlíkahald sum gjørligt, og tí vildi eg hava vindeygu við aluminiumsprofilum útvendiga til míni hús. Eg visti av royndum, at donsku Velfac vindeyguni best luku hesar treytir. Sambandið við verksmiðjuna førdi til, at eg fekk møguleika at gerast umboðsmaður teirra í Føroyum.

Hetta var byrjanin til smápartafelagið Byggitilfar, sum Harald og Suni Joensen eiga í felag. Herfyri lat felagið upp eina søluframsýning í Hákunargøtu 6 í Hoyvík.



*Harald Winther Knudsen, Suna Joensen og Gutti Harryson í nýggja framsýningarhølinum hjá sp/f Byggitilfar*

Umframt Velfac-vindeyguni innflutti felagið eisini betongelement frá Tinglev Elementfabrik í byrjanini. Hesar vørur kunnu nú seljast bíliga í Føroyum, tí sp/f Byggitilfar hevur fingið avtalu við framleiðararnar, sum ber í sær, at vørurnar kunnu seljast til verksmiðjuprís uttan vinning til millumhandlarar.

Sp/f Byggitilfar hevur síðan fingið líknandi avtalur við framleiðarar av trægólvum og granitflísum, og arbeitt verður støðugt við at finna nýggjar útvaldar dygdarvørur at selja eftir sama prísvinarliga leisti.

Tað fyrst og fremst byggiharrar, timburmeistarar og timburhandlar, sum fyritøkan vendir seg til, men eisini til einstaklingar við størri verkætlanum.

Søluframsýningin hjá sp/f Byggitilfar í Hákunargøtu 6 er opin hvønn gerandisdag millum kl. 15.30 og 18 og leygardag frá 13 til 16.